


TAK ALLA FAMILJUNA VIÐ TIL DANLAND

Pakkið bilin heima í túninum, koyrið umborð og hugnið tykkum á ferðini. Soleiðis koma tit frísk og vælúthvíld til dyrnar á Danland í Hirtshals – bert fáar kilometrar frá Hanstholm, har Norröna leggur at. Lættari gerst tað ikki. Danland hevur alt, sum krevst fyri at tit og børnini fáa eina ógloymandi viku saman.

2 vaksin, 2 børn og 1 bilur 1 vika í Danland úr bert **10.216,-**

**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4 koyggjukamari v. wc/bað innv. Hartil uppihald í 2 verilsis íbúð á Danland í Hirtshals. **Eykakostnaður:** Oljuavgjald kr. 120,- fyri hvønn ferðandi og avgreiðslugjald kr. 120,- fyri bíleggingina. Tilboðið er galdandi í tíðarskeiðnum 18.05-01.06.

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

NOREG · ÍSLAND
HETLAND · DANMARK
CRUISE

WWW.SMYRIL-LINE.COM
TLF 34 59 00

# Fíggjarleiðari til Strandfaraskip Landsins

Kanst tú stýra búskapinum? Dámar tær at luttaka í strategiskum menningarætlanum? Og ert tú ein góður leiðari?



Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum dugnaligum og dámligum fíggjarleiðara at byrja skjótast gjørligt, nú okkara fíggjarleiðari hevur tikið við nýggjum avbjóðingum í føroyska vinnulívinum.

**Starvið**
Fíggjarleiðarin hevur ábyrgdina av og skipar fyri fíggjarstýringini og roknskaparhaldinum á Strandfaraskipum Landsins. Fíggjarleiðarin er partur av leiðslubólkinum og luttekur í strategisku menningini av fyritøkuni. Fíggjarleiðarin vísir beinleiðis til stjóran.

**Umsøkjarin**
Tú hevur útbúgving og royndir innan fyri fíggjarstýring og/ella roknskap. Royndir við fíggjarstýringsskipanini hjá Navision og kunningartøkni annars eru ein fyrimunur. Vit vænta, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni, og royndir í prosjektleiðslu eru ein fyrimunur. Tú arbeiðir analytiskt og málrættað, og tú megnar at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Leiðarin hevur stóra ávirkan á egin viðurskifti og menningina av Strandfaraskipum Landsins.

Starvið er lønt í 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannstarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

**Umsóknir**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Kristian Davidsen, stjóra, ella Johnni M. Poulsen, fíggjarleiðara, á telefon 34 30 00.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Skrivligar umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 21. apríl og skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att.: Páll Heinesen
Yviri við Strond 4
Postboks 88
FO 110 Tórshavn
ella teldupost: pah@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins fevna um Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir, sum skulu lúka landsins tørv á fólkaflutningi. Fyritøkan skal mest gjørligt rekast á handilsligum grundarlagi. Stórar broytingar eru hendar á Strandfaraskipum Landsins seinnu árini, og víðfevndar menningarætlanir liggja fyri stavn. Millum hesar kann nevnast ein framhaldandi uppstiging og endurnýgging av tænastukervinum á sjógvi og landi.

STRANDFARASKIP LANDSINS

sansir.fo